Ingeborg Vinter langar til:

# Hetta er ein skammblettur



*Eftir tað, sum nú er hent, er ongin orsøk hjá fakfeløgunum til at vísa samfelagssinni, sigur Ingeborg Vinther, forkvinna í landsins størsta fakfelag, Føroya Arbeiðarafelag*

**Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya størsta fakfelag, er ikki sørt skelkað av, at Løgtingið hevur samtykt at hækka eftirlønina hjá landsstýrismonnunum munandi**

EFTIRLØN HJÁ LANDSSTÝRIS-MONNUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta er hvørki rætt ella rættvíst. Hetta er tvørturímóti ein skammblettur fyri Føroya Land.

Tað hevur skelkað Ingeborg Vinther, forkvinnu í Føroya størsta fakfelag, ikki sørt, at Løgtingið hevur samtykt at hækka eftirlønina hjá landsstýrismonnunum munandi.

Tá ið Løgtingið atkvøddi um uppskotið, vóru tað javnaðarflokkurin og fólkaflokkurin, sum atkvøddu fyri og syrgdi fyri, at tað varð samtykt við 14 atkvøðum. Tjóðveldisflokkurin, Miðflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin atkvøddu nei og sostatt vóru bara 11 atkvøður ímóti. Hinvegin vildi sambandsflokkurin als ikki taka støðu og atkvøddi blankt og sostatt varð tað samtykt við einum meiriluta.

### Ómetaliga grovt

Tað, sum Ingeborg Vinther heldur er serliga grovt, er, at nú fáa landsstýrismenn eftirløn við afturvirkandi kraft, aftur til 1998.

Tað merkir, at tá ið eftirløn til ein landsstýrismann skal roknast út, verður 1998 brúkt sum grundarlag.

– Hetta er ómetaliga grovt og hetta er ein grov provokatión ímóti øllum pensjónistum og ímóti øllum Føroya Fólki, tí við hesum hava politikararnir lóggivið niður í sín egna lumma og hava syrgt fyri, at landsstýrismenn fáa ein framíhjárætt og fáa betri sømdir enn nakar skattgjaldari fær.

Ingeborg Vinter vísir á, at samstundis sum politikarar geva sær sjálvum eina sera góða eftirløn, ber onki til, tá ið eftirlønin hjá vanligum fólki skal fáast í rættlag.

– Pensjónistar liva á hungursmarkinum. Eftirlønin stendur so at siga í stað og klárar ikki at viga upp ímóti príshækkingunum, serliga nú oljan dýrkar so nógv. Oljan er nú so dýr, at tá ið ein pensjónistur hevur goldið ein oljutanga, er valla eitt oyra eftir av eftirlønini.

– At kalla tað einasta, sum er hent á eftirlønarøkinum, er, at viðbøturnar eru hækkaðar eitt sindur hesi seinastu nógvu árini og samhaldsfasti er hækkaður eitt sindur, men tað, sum veruliga hevur týdning, er, at grundupphæddin hækkar.

### Onki kemur burturúr

Samstundis átalar Ingeborg Vinther, at onki røkist fyri, at samgongan klárar at gera eina eftirlønarskipan til vanliga løntakaran.

– Politikarar hava í fleiri ár tosað um at gera eina eftirlønarskipan, men onki kemur burturúr. Men eitt úrslit verður helst, at allir løntakarar skulu betala ein prosentpart av lønini í ein eftirlønargrunn, soleiðis sum nógvir løntakarar longu gera.

Og Ingeborg Vinther heldur, at tað er blóðugur órættur, at allir vanligir skattaborgarar skulu noyðast at betala sína egna eftirløn, men teir, sum stýra landinum, syrgja fyri, at teir fáa hana úr landskassanum.

– Sosttatt skulu allir føroyingar fyrst betala sína egnu eftirløn, men síðani skulu teir eisini betala eftirlønina hjá landsstýrisfólkunum.

Annars sat ein arbeiðsbólkur og arbeiddi við eini eftirlønarskipan.

– Men hann er ikki til longur, tí nú eru tað embætisfólk í landsstýrinum, sum sigast at arbeiða við eini eftirlønarskipan. Men sostatt kann staðfestast, at løntakarar onga ávirkan fáa á, hvussu skipanin skal síggja út.

– Men eitt tað mest skilaleysa av øllum er, at samstundis, sum embætisfólk í Fíggjarmálaráðnum arbeiða við eini eftirlønarskipan, er eisini ein arbeiðsbólkur settur undir Visjón 2015 at arbeiða við akkurát tí sama.

Ingeborg Vinter minnir eisini á, at stutt eftir, at løgtingslimirnir seinast hækkaði sína egnu løn fyri nøkrum árum síðani, varð heitt á tey um at vera hóvlig í sínum krøvum og at vísa samfelagssinni.

– Tað verður helst tað sama til tey næstu samráðingarnar, at politikararnir fara at biðja fakfeløgini vísa hógv, samstundis sum teir fáa sær sjálvum í posa í sekk.

– Men eitt er vist og tað er, fakfeløgini hava onga orsøk til at vísa samfelagssinni, tí politikararnir gera tað í hvussu so er ikki, sigur Ingeborg Vinther.

*Lesið meira um sama evni á síðu 15*

---

# Fer at raka løgmann og javnaðarflokkin hart

**– Tað fer at svíða fast hjá javnaðarflokkinum og løgmanni, at teir hava hækkað sína egnirløn**

EFTIRLØN HJÁ LANDSSSTÝRIS-MONNUM
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta fer at raka bæði løgmann og javnaðarflokkin beint aftur í høvdið.

Tað er metingin hjá Vígdis Johannesen, nú samgongan hevur samtykt at hækka eftirlønina hjá landsstýrismonnum.

Forkvinnan hjá Havnar Arbeiðsmannafelag heldur, at við hesum hevur javnaðarflokkurin av álvara fingið sína stevnuskrá í klemmu og tá ið løgtingsval verður aftur, fer hetta eisini at merkjast hjá flokkinum, tað ivast hon ikki í.

Hon heldur, at tað, sum er hent, líkist ongum, tí samstundis sum politikarar syrgja fyri at tryggja sína egnu eftirløn, samstundis viðurskiftini hjá vanligum pensjónistum og vanligum løntakarum yvirhøvur, ikki fæst í rættlag.

Vígdis Johannesen vísur á, at pensjónirnar hava staðið í stað í fleiri ár og hóast onkrar smávegis hækkingar eru, er tað als ikki nóg mikið til at svara til príshækkingina og tí minkar virðið á vanligu pensjónini hvønn einasta dag.

– Og hjá øllum teimum, sum forvinna eitt oyra afturat pensjónini, verða viðbøturnar skerdar, leggur hon afturat. Hetta hendir har fakfeløg hava fingið sær sína egnu eftirløn.

Hon sigur, at vóru allar pensjónir fingnar í rættlag, vildi hon eisini tosa um eftirlønt til landsstýrismenn, men hon hevur onki forstáilsi fyri, at teir hækka sína egnu eftirløn nú.

– Hetta er ikki rætta løtan, sigur hon.

Hon dugir ikki at siga, hvørja ávirkan hetta fer at fáa eina komandi samráðingar.

Men hon heldur, at har, sum hetta fer at ávirka mest, er á atkvøðutalinum hjá javnaðarflokkinum, tá ið Løgtingsval verður aftur.

– Tá ið hendan samgongan kom til, varð tosað um ein skattalætta til tey lágløntu. Vit vístu beinanvegin á, at tað fóru at vera háinntøkurnar, sum fóru við skattalættanum og tíverri fingu vit rætt.

– Men tá varð eisini sagt, at samhaldsfasti skuldi hækkast munandi afturfyri skattalættan. Men tað er so ikki hent og tað fer heldur ikki at henda.

Vígdis ásannar, at samhaldsfasti er hækkaður eitt sindur, men tað er onki av týdningi og slett onki ímóti skattalættanum og príshækkingum o.s.fr.



*Javnaðarflokkurin hevur brent seg alvorliga, men tað fer nokk eisini at síggjast aftur á einum komandi løgtingsvali, heldur forkvinnan í Havnar Arbeiðskvinnufelag, Vígdis Johannesen*